## Bourbon umhugsar bót



Norska reiðaríið Bourbon Offshore Norway hevur fingið betri tíð til at taka støðu til eina bót, sum felagið fekk í sambandi við vanlukkuna, tá hjálparskipið Bourbon Dolphin holvdist og sakk nærhendis Hetlandi í apríl í 2007. Fyri trimum vikum síðani fekk reiðaríið fimm milliónir krónur í bót, tí tað hevði ikki givið skiparanum nóg góð tíð til at kunna seg um skipið, manningina og uppgávurnar. Reiðaríið hevur nú fingið freist til tann 16. februar at taka støðu til bótina. Átta fólk doyðu við Bourbon Dolphin.

## Embætismenn minni løn

Fleiri av teimum ovastu embætismonnunum í Íslandi fara nú niður í løn í einari roynd at hjálpa tí almenna ígjøgnum fíggjarkreppuna. Sambært einari semju missa summir embætismenn heilt upp í 15 prosent av lønini frá næsta mánaði at rokna. Millum teirra, sum fara niður í løn, eru forstjórin á landssjúkrahúsinum, dómararnir í hægstarætti og stjórarnir í aðalráðunum hjá stjórnini, sigur íslendska ríkisútvarpið. Lønin hjá íslendskum ráðharrum og tingmonnum lækkaði á nýggjárinum.

# Orðna alt á køksborðinum



*Nýtt samstarv millum Suðuroyar Sparikassa og Postverk Føroya, GiroBanki, skal gera tað høgligari hjá vanligum borgarum og kundum at avgreiða øll síni peningaviðurskifti*

*Mynd: Tilvildarlig mynd*

**Nýggj kurértænasta frá Postverk Føroya ger tað nú møguligt at avgreiða øll tíni peningaviðurskifti á køksborðinum ella á arbeiðsplássinum**

**SAMSTARV**
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nú eru Postverk Føroya og Suðuroyar Sparikassi farin undir eitt samstarv, GiroBanki, sum hevur til endamál at gera tað lættari hjá vanligum borgarum og fyritøkum at avgreiða síni peningaviðurskifti.

Tann 9. februar verður nevnliga nýggj kurértænasta sett í verk. Ætlanin við nýggju skipanini er, at kundarnir skulu kunna avgreiða øll síni peningaviðurskifti á køksborðinum ella á arbeiðsplássinum.

Seinnu árini hevur nógv rumbul verið um, at smáu deildirnar hjá peningastovnunum hava latið aftur, og at tað tískil hevur verið sera torført hjá nógvum fólkum at fáa avgreitt síni vanligu bankaviðurskifti, so sum at gjalda rokningar og taka út pening. Ætlanin við nýggja samstarvinum er at bøta um henda trupulleikan, soleiðs at tað ikki longur verður neyðugt at fara á posthúsið ella í peningastovnin fyri at avgreiða hesi viðurskiftini.

Ein broyting, sum verður gjørd í samband við nýggju tænastuna, er, at summi av girokortunum fara úr gildi. Talan er um tey girokortini, sum ikki kundu avgreiðast um heimagreiðsluna.

Endamálið við samstarvinum er at gera tað meira tøkniliga atkomuligt at avgreiða síni bankaviðurskifti, umframt at gera tað meira atkomiligt hjá teimum kundum, sum ikki hava posthús ella peningastovn í nærumhvørvinum, sigur Sofus Clementsen, stjóri á Postverk Føroya

### Koma árla og seint

Kurértænastan, sum Postverk Føroya nú fer at bjóða, verður eftir ætlan virkin stóran part av døgninum.

Skipanin kemur at virka soleiðs, at fólk kunnu ringja til Postverk Føroya og bíleggja tænastuna, og so kemur fólk á staðið, har tú hevur brúk fyri at avgreiða tíni viðurskifti. Tað kann vera heima við hús ella á arbeiðsplássinum. Kurérskipanin verður aktiv tíðliga á morgni og seint út á kvøldið, soleiðis at tað verður høgligari hjá kundanum, greiðir Sofus Clementsen frá.

Kurértænastan er serliga ætlað fólki og virkjum, sum ikki nýta netgreiðsluna, meðan broytingin við girokortunum ger, at tey, ið nýta netgreiðsluna, kunnu greiða øll síni viðurskifti har. Sjálv tænastan kemur at líkjast tí, vit kenna frá gomlu útberingarskipanini, har postboðið kom á dyrnar, og tú kundi avgreiða øll tíni viðurskifti gjøgnum hann.

Tá tú skal gjalda rokningar ella annað, so verður tað eisini gjørligt at gjalda bæði við reiðum peningi og við vanligum gjaldskortum, sigur Sofus Clementsen.

Postverksstjórin greiðir frá, at kurértænastan kemur at virka um alt landið, har landpostboð eru.

## Styrkir gjaldførið

Nýggja samstarvið millum Postverk Føroya og Suðuroyar Sparikassa gevur sjálvsagt fyrimunir til báðar partar av avtaluni. Fyri Suðuroyar Sparikassa merkir avtalan, at verandi giroskipanin hjá Postverk Føroya, og harvið eisini allar girokonturnar, verður flutt til kervið hjá Suðuroyar Sparikassa. Samstundis fara girokortini hjá Postverk Føroya í søguna, og framyvir verða bara FI-kort nýtt, sum jú eisini kunnu greiðast um netgreiðsluna.

Samstundis fáa kundar við girokonto atgongd til netgreiðslu og gjaldsskipanina. Harumframt verður eisini møguligt at fáa eitt gjaldskort til girokontuna, greiðir Søren Bruun, stjóri í Suðuroyar Sparikassa frá.

Harumframt hevur Postverk Føroya fingið Suðuroyar Sparikassa at røkja gjaldførið hjá Postverkinum. Hetta merkir fyri Suðuroyar Sparikassa, at tey fáa styrkt um gjaldførið hjá sparikassanum. Við hesi flyting kemur Suðuroyar Sparikassi at hava eitt útlánsprosent á 80 prosent, sum merkir at teir hava størri innlán enn útlán, og hetta er millum tey lægstu í danska ríkinum.

Fyri kundan merkir flytingin eisini, at girokontanurnar nú verða fevndar av trygdarnetinum hjá danska statinum, nakað ið ikki var gjørligt, tá Postverkið umsat giroskipanina.



SKEIÐ til byrjarar
16. og 17. februar '09

Excel I
- tey fyrstu fetini

**Situr tú enn við roknimaskinuni** og hyggur eitt sindur øvundsjúk/ur eftir teimum, sum bara tasta alt inn á Excel og vupti, so er úrslitið klárt? Ella brúkar og hevur tú kanska brúkt Excel í minni mun, men kundi hugsa tær at lært forritið heilt frá grundini?

**Tað er nú tú hevur møguleikan** at læra og fáa stóra gleði av Excel. Kom á 2-daga skeið saman við tínum líkum og fá Excel-dreymin uppfyltan;-). Teknað teg skjótast, tí plássið er sera avmarkað!

**Um Excel**
Excel er eitt rokniark, har tað er møguligt at arbeiða við tølum og grafum uppá allar hugsandi (og óhugsandi) hættir. Við at luttaka á hesum skeiðnum, fært tú grundleggjandi kunnleika til Excel. Tú lærir tær mest brúktu og mest týðandi funkurnar. Aftaná skeiðið kanst tú brúka og fáa stóra gleði av forritinum í tínum dagliga arbeiði.

**Skeiðið vendir sær til tey**, sum hava hug til, ja kanska í longri tíð hava havt hug til, at læra tær grundleggjandi, týðandi og mest brúktu funkurnar í Excel.

**Tú hevur lítlar ella ongar** royndir við Excel frammanundan, men vit rokna við, at tú hevur arbeitt við teldu áður.

**Tilmelding og les meira** um skeiðið á heimasíðu okkara - www.synergi.fo. Tú ert eisini vælkomin at ringja.

**Vælkomin til tiltøk hjá Synergi**

Synergi

Synergi • Tvørgøta 13 • 100 Tórshavn • www.synergi.fo • synergi@synergi.fo
32BELL (322355) • 322FAX (322329) • skype: synergiasa